# Spennandi dansi-blanding á Tvøroyri

**Leygarkvøldið verður stórur dansur í Ítróttarhøllini á Tvøroyri, har oddamenninir í tveimum av okkara allar kendastu dansibólkum fara at spæla**



*Frá vinstru eru tað Marner Lisberg úr Sputnik, tvíburðarnir Árni og Marnar Andreasen úr Blac Birds og Jens Lisberg úr Sputnik*

Tað er Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, sum skipar fyri stórdansi í Ítróttarhøllini í Trongisvági leygarkvøldið 31. mai.

Á pallinum verða ongir aðrir enn oddamenninir í tveimum av okkara allar fólkakærastu dansibólkum nakrantíð.

Úr Havnini koma teir báðir oddamenninir úr Black Birds, tvíburðarnir Árni og Marnar Andreasen suður á Tvøroyri at spæla. Somuleiðis fara teir báðir oddamenninir í lokala orkestrinum á Tvøroyri, Sputnik, brøðurnir Jens og Marner Lisberg, at geva sítt íkast til dansin.

Við sær hava teir tríggjar av okkara frægastu tónleikarum, Kolbein Simonsen á bassinum, Arnbjørn Sivertsen á gittarinum og Kaj Johannesen á trummum.

Umframt at spæla hvør í sær, fara teir eisini allir samlir at spæla nøkur løg saman.

Black Birds og Sputnik eru tveir av okkara best umtóktu dansibólkum og fløgur og bond, sum hesir bólkar og serliga oddamenninir hava gjørt, eru ímillum tað, sum hevur selt best í Føroyum.

Men hetta er fyrstu ferð, at teir royna hesa blandingina.

Seinast Froðbiar Sóknar Róðrarfelag skipaði fyri einum líknandi tiltaki, var fyri einum ári síðani og tá vóru 800 fólk í dansi og væntandi verða tað ikki færri hesuferð.

Fyrireikararnir siga, at hetta er eitt frálíkt høvi hjá fólki norðanfjørðs at koma til Suðuroyar á útferð og enda ferðina við einum rimmar dansikvøldið, tí hjá tí, sum hevur skund, slepst beinleiðis norður aftur við Smyrli klokkan sjey á morgni, men annars siglur hann aftur seinnapartin, so tað fæst eisini ein góður sunnudagur burtur úr í Suðuroy.

Hesir gomlu garparnir fara at leggja lunnar eitt minniligt dansikvøld í Suðuroy leygarkvøldið, tað er leygarkvøldið 31. mai.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind. Ivirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig, men har mjørki legst um 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landsynningi og regn av og á og mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, sunnudagin mest landsynningur. Okkurt ælið leygardagin, men sunnudagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 26 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 19 |
| New York | 23 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1029 hPa. við Føroyar fer spakuliga eystureftir. Eitt lágtrýst, 998 hPa. yvir Biscaya fer norðureftir.



**Í dag:**
Hátrýstið yvir Norðurhavinum stendur mestsum í stað. Lágtrýstið yvir Frankaríki fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/5 kl. 06⁰⁰ – 26/5 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,9°
Minsti hiti máldur í mai: -9,9° - Mesti hiti máldur í mai: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 25/5 kl. 06⁰⁰ – 26/5 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mai: 15 mm





I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

20. mai — Fullmáni / Mánin longst frá jørðini
28. mai — Seinna kvarter
3. juni — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. mai | - | 12:05 | 11:05 | 23:25 | 11:20 | 23:40 | 1:44 | 14:05 | 2:44 | 15:05 | 10:20 | 22:40 | 9:20 | 21:40 | - | 12:20 | 0:59 | 13:20 | 11:50 | - | 0:44 | 13:05 |
| 27. mai | 0:25 | 12:45 | 11:45 | - | - | 12:00 | 2:25 | 14:45 | 3:25 | 15:45 | 11:00 | 23:33 | 10:00 | 22:33 | 0:40 | 13:00 | 1:40 | 14:00 | 0:10 | 12:30 | 1:25 | 13:45 |
| 28. mai | 1:18 | 13:51 | 0:18 | 12:51 | 0:33 | 13:06 | 3:18 | 15:51 | 4:18 | 16:51 | - | 12:06 | 11:06 | 23:39 | 1:33 | 14:06 | 2:33 | 15:06 | 1:03 | 13:36 | 2:18 | 14:51 |
| 29. mai | 2:24 | 14:58 | 1:24 | 13:58 | 1:39 | 14:13 | 4:24 | 16:58 | 5:24 | 17:58 | 0:39 | 13:13 | - | 12:13 | 2:39 | 15:13 | 3:39 | 16:13 | 2:09 | 14:43 | 3:24 | 15:58 |
| 30. mai | 3:18 | 15:39 | 2:18 | 14:39 | 2:33 | 14:54 | 5:18 | 17:39 | 6:18 | 18:39 | 1:33 | 13:54 | 0:33 | 12:54 | 3:33 | 15:54 | 4:33 | 16:54 | 3:03 | 15:24 | 4:18 | 16:39 |